

## Kongafiskaveiðan í Smoguni er steðgað

Norsku skipini Atlantic Star, Havstrand og Koralen hava sambært norskum fjølmiðlum havt góðan fiskiskap eftir kongafiski norðuri á 74 stigum í Smoguni. Eini 25-30 onnur skip hava eisini roynt á leiðini.

Kongafiskurin, sum var í Smoguni, er nú farin inn í Svalbardsøkið, og tað fór hann eisini um hesa tíðina í fjør.

Avgerðin um at gevast við kongafiskaveiðini nú, er tikin av norsku myndugleikunum í samráð við Fiskebåtredernes Forbund.

Norðmenn halda, at rætt er at gevast at fiska, nú samráðingar skuldu vera í NEAFC í London.

Noreg heldur, at fiskiskapurin eigur at steðga, til kunnleikin um kongafiskastovnin í økinum er størri.

Felagið hjá reiðarunum heldur, at Havgranskingarstovnurin eigur at seta í verk neyvari kanningar fyri at fáa staðfest, hvussu stovnurin er fyri.

**-vilmund**




# Framløga av bók um rokskipara

**Í Stóra Pakkhúsi í Vági verður framløga í kvøld av bókini, Jóan Petur hjá Mouritsi, sum Absalon Absalonsen hevur skrivað. Eisini verður sangur, felagssangur og ein drekkamunnur at fáa**


FRAMLØGA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*


Í kvøld klokkan 20 verður almenn framløga av bókini hjá Absalon Absalonsen um Jóan Petur hjá Mouritsi, rokskipara úr Vági.

Framløgan verður í Stóra Pakkhúsi í Vági, har rithøvundurin fer at siga frá um bókina, og Finnbjørn og Terji fara at syngja. Eisini verður felagssangur saman við harmonikuspæli, og fólk fáa eisini ein drekkamunn.

Rithøvundurin Absalon Absalonsen, sum er vágbingur, er sjálvur sjómaður, og tað hevur hann verið alt sítt arbeiðslív. Hann fór til skips sum 15 ára gamalur og hevur higartil siglt í samfull 52 ár.

### Siglir og skrivar

Seinnu árini hevur Absalon eisini fingist við at yrkja og skriva.

Fyrsta útgávan hjá honum var yrkingasavnið, Løkur lítli, sum kom út fyri fýra árum síðan. Til jólar í fyrraári kom skaldsøgan, Hjálp úr neyð, og til jólar í fjør kom bókin um Sornhúsfólkini.

Nú kemur so bókin um Jóan Petur hjá Mouritsi – ella Jóan Petur Joensen, sum hann kallaðist.

# Sjómaður í hálva øld

**Í vikuni kemur út bók um rokskiparan úr Vági, Jóan Petur hjá Mouritsi, sum í sínari tíð setti met í snørisveiði við Yvonnu. Høvundurin, Absalon Absalonsen, sum eisini er vágbingur, hevur sjálvur siglt í meira enn hálva øld. Í bókini eru tilsamans 735 persónar og 155 skip og bátar nevnd**


ROKSKIPARI
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*




Bókin hjá Absalon Absalonsen um rokskiparan úr Vági verður til keyps í bókasølunum kring landið, sum dagarnir ganga. Hon kom higar til lands við Norrønu í gjár og verður fyrstu ferð løgd fram á almennu framløguni í Vági í kvøld.

Bókin er 383 blaðsíður og kostar í bókasølunum 360 krónur, men 300 krónur beinleiðis frá forlagnum, sum er Løkur lítli. Hetta er egið forlag, sum Absalon Absalonsen eigur sjálvur.

Rithøvundurin sigur, at tað hevur verið ógvuliga spennandi og áhugavert at sava tilfar saman um rokskiparan, Jóan Petur hjá Mouritsi.

### Met í snørisveiði

– Jóan Petur livdi í árunum, 1894-1963, og hann upplivdi soleiðis alla slupptíðina. Í 1931 setti hann met í fiskiskapi við snøri, tá hann sum skipari við Yvonnu fiskaði meira enn 3100 skippund. Hetta var fyrstu og einastu ferð, at eitt føroyskt snørisskip fiskaði meira enn 3000 skippund í eitt ár, sigur Absalon Absalonsen.

Vit kunnu leggja aftrat, at eitt skippund er 160 kilo.

Í bókini um Jóan Petur hjá Mouritsi, umrøður høvundurin eisini beiggja Jóan Petur, Dánjal hjá Mouritsi og sonin, Mourits hjá Jóan Peturi.

– Eg haldi, at tað setir sín dám á bókina, at eg havi kent hesar tríggjar og sjálvur havi siglt meira enn eina hálva øld, sigur høvundurin.

Tilsamans 735 persónar eru nevndir í bókini og 155 skip og bátar.

### Niðurskotnir

Jóan Petur hjá Mouritsi doyði umborð á Saksabergi undir Grønlandi í 1963.

– Hetta er søgan um smádreingin, sum lærarin einki væntaði sær av, men longu sum 12 ára gamal kortini tók tey vaksnu á bóli.

Høvundurin sigur, at Jóan Petur altíð var millum teir bestu – ella bestur at fiska á skipi í sjálvdrátti, og sum skipari var hann altíð millum teir fremstu.

– Hann var 22 ára gamalur, tá ið hann fyrstu ferð førdi skip. Tá vórðu teir niðurskotnir á Føroyabanka, men manningin varð bjargað. Sum sjómaður megnaði Jóan Petur fleiri ferðir tað, sum fyri øðrum kundi tykjast ógjørligt.

Øll tey 12 skipini, sum vórðu søkt við Føroyar eftir einum samdøgni, verða umrødd í bókini hjá Absaloni.

– Sagt verður frá mongum sjáldsomum og áhugaverdum hendingum, og nógvir persónar, skip og bátar verða umrødd. Hópur er eisini av áhugaverdum veiðitølum og forvitnisligum myndum, sigur høvundurin.

### Í havsneyð

Jóan Petur hjá Mouritsi var